

betri

Betri Trygging P/F

# Hálvársfrásøgn 2021

Interim Report 1H 2021

# Innihaldsyvirlit

## Table of contents


| | |
|---|---|
| **5 ára yvirlit /** Five Year Summary | 4 |
| **Leiðslufrágreiðing /** Management Review | 5 |
| **Rakstrarroknskapur /** Income Statement | 8 |
| **Fíggjarstøða /** Balance Sheet | 9 |
| **Uppgerð av broyting í eginogn /** Statement of Changes in Equity | 11 |
| **Notur /** Notes | 12 |
| **Frágreiðing til lyklatølini /** Explanation of Key Figures | 14 |
| **Leiðsluátekning /** Statement by the Management | 15 |
| **Partafelagsupplýsingar /** Company Information | 16 |

# 5 ára yvirlit / Five Years Summary

| DKK 1.000 | 1H 2021 | 1H 2020 | 1H 2019 | 1H 2018 | 1H 2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur / Profit & Loss** | | | | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross written premiums | 218.028 | 214.368 | 194.973 | 180.862 | 178.989 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -105.851 | -189.668 | -130.057 | -109.379 | -463.364 |
| Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi í alt / Total operational expenses | -31.988 | -30.918 | -35.381 | -36.847 | -35.652 |
| Úrslit av endurtrygging / Reinsurance result | -26.407 | 22.300 | -22.911 | -25.885 | 311.107 |
| Tryggingartekniskt úrslit / Technical result | 51.182 | 15.080 | 4.840 | 6.255 | -12.082 |
| Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu / Investment yield after tech.interest rate income | 12.277 | -6.975 | 33.481 | 2.121 | 12.298 |
| Ársúrslit / Net profit | 52.399 | 7.568 | 31.850 | 7.688 | 447 |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning / Result from net claims provisions | 8.281 | -9.650 | 1.195 | -2.049 | 3.056 |
| **Fíggjarstøða / Balance Sheet** | | | | | |
| Tryggingartekniskar avsetingar / Total technical provisions | 650.974 | 647.474 | 556.700 | 602.483 | 885.080 |
| Tryggingaráogn / Total technical assets | 171.012 | 167.401 | 108.484 | 113.482 | 440.801 |
| Eginogn í alt / Total equity | 727.936 | 649.261 | 640.899 | 556.095 | 470.909 |
| Ognir í alt / Total assets | 1.413.299 | 1.318.528 | 1.235.577 | 1.183.150 | 1.385.274 |
| **Lyklatøl / Key Ratios** | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 48,9 | 89,0 | 67,3 | 61,2 | 262,0 |
| Bruttokostnaðarprosent / Cost ratio | 14,8 | 14,5 | 18,3 | 20,6 | 20,2 |
| Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio | 12,2 | -10,5 | 11,9 | 14,5 | -175,9 |
| Combined ratio / Combined ratio | 75,8 | 93,0 | 97,4 | 96,3 | 106,3 |
| Operating ratio / Operating ratio | 76,2 | 92,9 | 97,4 | 96,5 | 106,9 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum / Relative effect on provisions | 2,4 | -2,1 | 0,4 | 0,0 | 1,3 |
| Eginognsavkast / Return on equity | 7,3 | 1,1 | 5,2 | 1,4 | 0,1 |
| Solvensdekningur / Solvency [1)] | 278% | 293% | 281% | | |

1) Við broytingunum í kunngerðini frá 1. januar 2019 um ársfrásagnir fyri tryggingarfeløg skal lyklatalið solvensdekningur roknast sum lutfallið millum grundarfæfeingi og tað størsta av kapitalkravinum og individuella solvenstørvinum og upplýsast í prosentum. Ongi samberingartøl eru tí fyri árini 2017-2018. / In accordance with changes made in the Executive order on annual reports from 2019 the Solvency ratio is calculated as the ratio of the Base Capital and the greater of the the Capital Demand or the Solvency Capital Requirement. It has not been possible to calculate the figures in 2017 to 2018.

# Leiðslufrágreiðing

Management Review

## Í stuttum / Highlights

- Úrslitið farna tíðarskeið 52,4 mió. kr. / Net result DKK 52.4 million.
- Úrslitið áðrenn skatt 63,5 mió. kr. / Profit before tax DKK 63.5 million
- Tryggingartekniska úrslitið 51,2 mió. kr. / Technical profit DKK 51.2 million.
- Grundarfæfeingið við hálvárið 694,8 mió. kr. / Base Capital at 1H DKK 694.8 million.
- Roknaður solvenstørvur 221,2 mió. kr. / Calculated solvency requirement DKK 221.2 million.
- Yvirdekningur í mun til roknaðan solvenstørv 426,9 mió. kr. / Excess relative to calculated solvency DKK 426.9 million.
- Úrslitið 2021 fyri skatt verður væntandi millum 65-85 mió. kr. / Outlook for 2021 is expected to be DKK 65-85 million profit before tax.

Betri Trygging P/F rekur skaðatryggingarvirksemi á føroyska marknaðinum, og veitir tryggingarvørur til privata og vinnuliga marknaðin, herundir til føroysku sjóvinnuna.

Felagið hevur djúpar røtur í føroyska samfelagnum og føroyska samleikanum. Søga felagsins gongur aftur til 1940, tá ið Tryggingarsambandið Føroyar S/F varð sett á stovn, og fyri partar av virkseminum uppaftur longri aftur. Føroya Vanlukkutrygging og Føroya Brunatrygging, sum í 1940 gjørdust partar av Tryggingarsambandinum Føroyum S/F, vórðu stovnað í ávikavist 1925 og 1937.

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Trygging P/F, og eigur allan partapeningin í felagnum.

### Úrslit

Betri Trygging hevði eitt úrslit áðrenn skatt fyrra hálvár 2021 á 63,5 mió.kr., samanborið við 8,1 mió.kr. fyrra hálvár 2020.

Úrslitið áðrenn skatt stavar frá tryggingartekniskum úrsliti á 51,2 mió. kr. og íløguavkasti á 12,3 mió. kr.

Samlaða úrslitið í fyrra hálvári, sum serliga stavar frá góðari skaðagongd við fáum stórskaðum, verður mett at vera gott.

### Tryggingargjøld

Tryggingargjøld fyri egna rokning í fyrra hálvári 2021 vóru 184,9 mió.kr. ímóti 183,5 mió.kr. fyrra hálvár 2020. Gongdin í tryggingarinntøkum verður mett nøktandi.

### Skaðaendurgjøld

Skaðabøturnar fyri egna rokning í fyrra hálvári 2021 vóru 101,3 mió.kr. ímóti 138,5 mió.kr. sama tíðarskeið í 2020.

Fyrra hálvár er sum heild merkt av fáum stórum skaðum.

### Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi

Bruttokostnaðarprosent var 14,8 í mun til 14,5 í 2020. Lága kostnaðarprosentið stavar í mestan mun frá neyvum eftirliti við rakstrarkostnaði og frá øktum tryggingargjøldum.

Rakstrarkostnaðirnir fyrra hálvár 2021 vóru 29,8 mió.kr. ímóti 28,9 mió.kr. fyrra hálvár 2020. Lágu kostnaðirnir eru úrslit av miðvísari kostnaðarstýring seinastu árini.

### Tryggingartekniskt úrslit

Tryggingartekniska úrslitið gjørdist eitt avlop á 51,2 mió.kr. ímóti 15,1 mió.kr. fyrra hálvár 2020.

Combined Ratio í fyrra hálvári 2021 er 75,8%, ið er væl betur enn fyrra hálvár 2020.

Leiðsla felagsins metir, at tryggingartekniska úrslitið er nøktandi.

### Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu

Íløguúrslitið varð 12,3 mió.kr. fyrra hálvár 2021 ímóti -7,0 mió. kr. fyrra hálvár 2020. Íløguúrslitið stavar frá hækkandi virði á partabrøvum og hægri rentustøði.

Felagið hevur hildið fast við varna íløgupolitikkin, og tí verður íløguúrslitið mett nøktandi.

## Kapitalur og solvensur

Eginogn felagsins tann 30. juni 2021 var 728 mió. kr. ímóti 649 mió. kr. tann 30. juni 2020.

Solvenskravið (individuella solvenskravið), roknað eftir ásetingunum í kunngerðini, var 261 mió. kr. tann 30. juni 2021.

Grundarfæfeingið við hálvárið 2021 var 727 mió. kr., og solvensdekningur felagsins 278%.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok eru ongar týðandi hendingar, sum broyta metingina av hálvársfrásøgnini.

## Útlit og váðar í 2021

Úrslitið, tað ið eftir er av árinum, kann verða ávirkað av veðri, av einstøkum stórum skaðum, og annars av gongdini á tryggingarmarknaðinum.

Gongdin í samfelagnum sæst aftur í hækkaðum tryggingarinntøkum. Væntandi heldur hendan gongdin fram í seinnu hálvu av 2021.

Hóast óvissa er um skaðagongdina seinna hálvár, verður mett, at skaðaendurgjøld fyri egna rokning verða sum væntað varð við ársbyrjan.

Kostnaðarstøði felagsins er við hálvárið nakað lægri, enn mett varð við ársbyrjan. Roknað verður kortini við, at kostnaðarstøðið, tá árið er runnið, verður sum mett við ársbyrjan.

Íløguúrslitið í seinna hálvári verður ávirkað av gongdini á altjóða fíggjarmarknaðunum og rentustøðinum. Av tí at felagið hevur valt ein varnan íløgupolitikk, og m.a. hevur avmarkað íløgur í partabrøv, er íløguúrslitið í mestan mun tengt at gongdini í lánsbrøvum og rentustøðinum. Trupult er at meta um rentustøðið komandi hálvárið, men roknað verður ikki við, at evropeiska stýringsrentan verður broytt munandi tað, ið eftir er av árinum. Hækkar rentan hevur hetta neilig árin á íløguúrslitið.

Samanumtikið verður mett, at ársúrslitið áðrenn skatt fyri 2021 verður umleið 65-85 mió.kr.

## Summary

Betri Trygging P/F operates on the Faroese non-life insurances marked and offers insurance products within the Private, Commercial and Maritime segment.

The company is a subsidiary of Betri P/F and therefore a part of Betri P/F consolidated interim report.

Betri Trygging P/F pre-tax profit for H1 was 63 mDKK compared to 8 mDKK for the same period last year. As of the 30th of June 2021 the equity amounted to 728 mDKK and the balance sheet amounted to 1,413 mDKK.

Net insurance premiums were 185 mDKK compared to 183 mDKK the same period last year. The development in net insurance premiums is satisfying.

Net insurance claims for H1 2021 were 101 mDKK compared to 138 mDKK the same period last year. This is lower than expected and is due to fewer large claims in the periode.

Total net operating expenses were 30 mDKK compared to 29 mDKK in H1 2020. Cost ratio is 14.8.

The technical result for H1 was 51 mDKK compared to 15 mDKK the same period last year. Combined ratio for H1 2021 was 75.8 compared to 93.0 in 2020.

The technical result is considered satisfying.

Investment result for H1 2021 was 12 mDKK compared to -7.0 mDKK the same period last year.

No significant events have occurred after the 30 of June 2021 that affect the result for H1 2021.

The published outlook for 2021 can be affected by weather conditions, single large claims, and changes in the Faroese insurance market.

The investment activities for the rest of 2021 will be affected by the development in the global financial markets and the fixed income marked. Due to the conservative investment policy of Betri Trygging P/F, the company is to a high degree exposed to the fixed income marked and hence the interest rate levels. Due to considerable global economic uncertainty, it is difficult to predict the interestlevels in the foreseeable future.

The expectations for second half of 2021 are, that net insurance premiums will be about the same as in H1, net insurance claims will be as aspected and net operating costs will be somewhat higher than in H1. Overall expectations are, that the result for H2 will be positive.

The result for 2021 is considred to be somewhere between 65-85 mDKK.

# Rakstrarroknskapur / Income Statement

| DKK 1.000 | 1H 2021 | 1H 2020 |
|---|---|---|
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning / Premiums written net of reinsurance** | | |
| Tryggingargjøld brutto / Gross written premiums | 219.964 | 217.221 |
| Endurtryggingargjøld / Reinsurance premiums | -33.158 | -28.926 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum / Change in premiums provisions | -1.936 | -2.853 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsettum tryggingargjøldum / Change in reinsurance premiums provisions | 0 | -1.991 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Total premiums written net of reinsurance** | **184.870** | **183.451** |
| **Renta av tryggingarvirksemi / Interest rate income from insurance activity** | **-1.173** | **247** |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning / Compensation expenses net of reinsurance** | | |
| Útgoldnar veitingar / Claims paid | -164.817 | -214.432 |
| Endurgoldið frá endurtryggingum / Reinsurance recoveries received | 51.896 | 30.872 |
| Broyting í avsettum endurgjøldum / Change in claims provisions | 62.608 | 22.436 |
| Broyting í váðaískoyti / Change in risk margin | -3.642 | 2.328 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsetingum til endurgjøld / Change in reinsurance claims provisions | -47.304 | 20.315 |
| **Skaðaendurgjøld fyri egna rokning í alt / Total compensation expenses net of reinsurance** | **-101.259** | **-138.481** |
| **Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum / Bonus and rebates** | **-1.427** | **-1.250** |
| **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning / Net operating expenses** | | |
| Útveganarkostnaður / Acquisition costs | -19.392 | -18.688 |
| Fyrisitingarkostnaður / Administration costs | -12.596 | -12.230 |
| **Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður í alt / Total acquisition and administration expenses** | **-31.988** | **-30.918** |
| Ómaksløn og avlopsbýti frá endurtryggjarum / Fee and profitshare from reinsurers | 2.160 | 2.030 |
| **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi f.e.r. í alt / Total net operating expenses** | **-29.829** | **-28.887** |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical profit/loss** | **51.182** | **15.080** |
| **Úrslit av íløguvirksemi/ Return on investment assets** | | |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. / Interest rate income and dividend etc | 4.501 | 3.102 |
| Virðisjavningar / Market value adjustments | 6.691 | -10.385 |
| Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi / Administration costs related to investment activity | -88 | 555 |
| **Úrslit av íløguvirksemi í alt / Total return on investments** | **11.104** | **-6.728** |
| **Renta og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Interest rate and fair value adjustments from technical provisions** | **1.173** | **-247** |
| **Íløguavkast eftir tryggingartekniska rentu / Investment yield after technical interest rate income** | **12.277** | **-6.975** |
| **Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax** | **63.459** | **8.105** |
| **Skattur / Tax** | **-11.061** | **-537** |
| **Úrslit / Net profit** | **52.399** | **7.568** |

# Fíggjarstøða / Balance Sheet

| DKK 1.000 | 30.06.2021 | 31.12.2020 |
|---|---|---|
| **Ogn / Assets** | | |
| **Immateriell ogn / Intangible assets** | **79** | **159** |
| **Materiell ogn / Tangible assets** | | |
| Rakstrargøgn / Operating equipment | 3.352 | 3.137 |
| Bygningar til egna nýtslu / Domicile properties | 85.859 | 82.053 |
| **Materiell ogn í alt / Total tangible assets** | **89.210** | **85.190** |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir / Other financial investments** | | |
| Kapitalpartar / Shares | 152 | 154 |
| Íløguprógv / Investment funds | 339.081 | 416.395 |
| Lánsbrøv / Bonds | 726.104 | 607.060 |
| Innlán í kreditfeløgum / Deposits | 46.448 | 27.026 |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt / Total other financial investments** | **1.111.784** | **1.050.635** |
| **Íløguogn í alt / Total financial investments** | **1.111.784** | **1.050.635** |
| **Áogn / Outstanding accounts** | | |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum / Reinsurers' share of premium provisions | 7.948 | 7.948 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld / Reinsurers' share of claims provisions | 163.064 | 210.368 |
| **Endurtryggjaranna partur av tryggingartekniskum avsetingum í alt / Total reinsurers' share of provisions for insurance contracts** | **171.012** | **218.316** |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 30.928 | 32.807 |
| **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt / Total receivables in connection with direct insurance contracts** | **30.928** | **32.807** |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 0 | 8.127 |
| **Onnur áogn í alt / Total other receivables** | **0** | **8.127** |
| **Áogn í alt / Total receivables** | **201.940** | **259.249** |
| **Onnur ogn / Other assets** | | |
| Útsett skattaogn / Deffered tax surplus | 1.963 | 2.194 |
| **Onnur ogn í alt / Total other assets** | **1.963** | **2.194** |
| **Tíðaravmarkingar / Accrued income** | | |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent | 1.361 | 1.700 |
| Aðrar tíðaravmarkingar / Other accrued income | 6.961 | 8.493 |
| **Tíðaravmarkingar í alt / Total accrued income** | **8.322** | **10.194** |
| **Ogn í alt / Total assets** | **1.413.299** | **1.407.620** |

# Fíggjarstøða / Balance Sheet

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2021 | 31.12.2020 |
|---|---|---|---|
| | **Skyldur / Liabilities** | | |
| | | | |
| | **Eginogn / Equity** | | |
| | Partapeningur / Share capital | 400.000 | 400.000 |
| | Flutt úrslit / Retained earnings | 327.936 | 275.537 |
| | Vinningsbýti / Dividend | 0 | 33.500 |
| | **Eginogn í alt / Total equity** | **727.936** | **709.037** |
| | | | |
| | **Avsetingar til tryggingaravtalur / Technical provisions** | | |
| | Avsett tryggingargjøld / Premium provisions | 140.210 | 94.005 |
| | Avsett til endurgjøld / Claims provisions | 486.407 | 550.582 |
| | Váðaískoyti á tryggingaravtalum / Risk margin | 22.952 | 19.310 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum / Bonus and discount provisions | 1.405 | 3.640 |
| | **Avsetingar til tryggingaravtalur í alt / Total technical provisions** | **650.974** | **667.537** |
| | | | |
| | **Avsettar skyldur / Provisions** | | |
| | Eftirlønir og tílíkar skyldur / Pensions and similar obligations | 2.413 | 2.413 |
| | **Avsetingar í alt / Total provisions** | **2.413** | **2.413** |
| | | | |
| | **Skuld / Debt** | | |
| | Skuld í sambandi við beinleiðis trygging / Debt related to direct insurance | 1.393 | 1.194 |
| | Skuld í sambandi við endurtrygging / Debt related to reinsurance | 8.787 | 4.682 |
| | Skuld til atknýtt feløg / Debt to affiliated companies | 10.884 | 10.126 |
| | Skattur / Tax | 0 | 0 |
| | Onnur skuld / Other | 10.912 | 12.630 |
| | **Skuld í alt / Total debt** | **31.977** | **28.633** |
| | | | |
| | **Skyldur í alt / Total liabilities** | **1.413.299** | **1.407.620** |

1 Nýttur roknskaparháttur / Significant accounting policies

# Uppgerð av broyting í eginogn / Statement of Changes in Equity

| DKK 1.000 | Partapeningur / Share capital | Flutt úrslit / Retained earnings | Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividends | Eginogn / Equity |
|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2020 / Shareholders' equity at January 1, 2020** | **400.000** | **241.693** | **32.500** | **674.193** |
| **Rørslur á eginognini í 2020 / Movements on equity in 2020** | | | -32.500 | -32.500 |
| Ársúrslit / Net profit | 0 | 33.844 | 33.500 | 67.344 |
| **Eginogn 31. desember 2020 / Shareholders' equity at December 31, 2020** | **400.000** | **275.537** | **33.500** | **709.037** |
| | | | | |
| **Broytt eginogn 1. januar 2021 / Adjusted Shareholders' equity at January 1, 2021** | **400.000** | **275.537** | **33.500** | **709.037** |
| **Rørslur á eginognini í 2021 / Movements on equity in 2021** | | | -33.500 | -33.500 |
| Úrslit / Net profit | 0 | 52.399 | 0 | 52.399 |
| **Eginogn 30. juni 2021 / Shareholders' equity at June 30, 2021** | **400.000** | **327.936** | **0** | **727.936** |

# Notur / Notes

**Nota** **DKK 1.000**

1 **Nýttur roknskaparháttur / Significant accounting policies**

## Alment

Hálvársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 4).

Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2020, og verður tí víst til hesa.

Hálvársroknskapurin verður vístur í donskum krónum, sum er virkisgjaldoyra felagsins.. Øll onnur gjaldoyru verða mett sum fremmant gjaldoyra.

### Grannskoðan og gjøgnumgongd

Hálvársfrásøgnin fyri 2021 er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

### Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginognsuppgerð og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt sær, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og samløguna av teimum einstøku tølunum.

### Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virði á ognunum kann gerast upp álítandi. Fíggjarlig amboð verða innroknað samsvarandi hesum og verða tikin við í ársfrásøgnina á handilsdegnum.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast álítandi upp.

Fíggjarlig amboð verða innroknað á handilsdegnum. Innrokningin steðgar, tá rætturin at móttaka ella lata pengar frá fíggjarliga amboðnum fer úr gildi, ella um fíggjarliga amboðið verður avhendað og váðin og rættindini til vinning í sambandi við ognarrættin í høvuðsheitum eru flutt til annan eigara.

## Generally

The H1 Interim Report is rendered in accordance with the regulations and meets the requirements stipulated by the Faroese Insurance Act and Executive order no. 4 of 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies (henceforth Order no. 4).

Applied accounting policy is unchanged compared to the annual report 2020.

The H1 Interim Report is shown in Danish krone (DKK), which is the functional currency of the company. All other currencies are valued as foreign currency.

### Audit and review

The H1 Interim Report has not been audited or reviewed.

### Rounding of figures

The figures in the income statement, the balance and the notes are rounded off. Because the figures are rounded off separately, the rounded figures may add up differently than the underlying figures.

### Inclusion and valuation in the annual report

Assets are included in the balance sheet when it is likely that the Company will derive future financial profit from them and the asset value can be reliably assessed. Financial instruments are included according to this and are included in the annual report on the day of transaction.

Liabilities are included in the balance sheet when it is likely that the Company will lose financial profit and the size of the liability can be reliably assessed.

Financial instruments are recognized at the date of settlement, and the recognition ceases when the right to receive or deliver cash flows from the financial instrument has expired, or if the financial instrument has been transferred, and the Company has essentially transferred all risks and returns associated with the ownership.

Tá ið ognir ella skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna á fyrsta sinni, verður hetta gjørt til dagsvirði. Tó verða óítøkiligar og ítøkiligar ognir á fyrsta sinni ásettar til útveganarvirði. Eftir hetta verða ognir og skyldur uppgjørdar einsæris, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið til upplýsingar um vinning, tap og váðar, ið koma til okkara kunnleika fram til dagin, tá frásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru fíggjarstøðudagin.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, eisini virðisjavning av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur, tryggingarveitingar, broyting í avsetingum og av- og niðurskrivingar – sum eru við til at røkka ársins inntøku.

### Konsernviðurskiftir og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslugrundaðum støði.

### Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virði av ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum. Avseting til skaðaendurgjald er tann roknskaparupphædd, sum í størstan mun er tengd at roknskaparligum metingum.

### Dagsvirðið av heimbýlisbygningum

Við áseting av dagsvirðinum av bygningum verður ein avkastgrundaður frymil nýttur. Dagsvirði á bygningum er grundað á eina afturdiskontering av framtíðar rakstri við individuelt ásettum avkastkrøvum. Avkastkravið er ásett við støði í staðnum, har bygningurin er, møguligari nýtslu, í mun til hvussu bygningurin er viðlíkahildin, hvørjum standi hann er í o.s.fr.

### Útlendskt gjaldoyra

Flytingar í fremmandum gjaldoyra verða við fyrstu innrokning umroknaðar til kursin á flytingardegnum.

Ágóði, skyldur og aðrar gjaldoyraligar upphæddir í fremmandum gjaldoyra, ið ikki eru avroknaðar uppgerðardagin, verða umroknaðar við tí endakursi, sum er galdandi uppgerðardagin.

Gjaldoyramunir, ið standast millum kursin handilsdagin og uppgerðardagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum 'Kursjavningar'.

### Lyklatøl

Lyklatøl eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 4 frá Tryggingareftirlitinum. Víst verður til brotið "Frágreiðing til lyklatølini" á síðu 14.

Assets and liabilities are initially shown at fair value. However, intangible and tangible assets at initial recognition are measured at cost. Subsequently, assets and liabilities are stated as described below for each entry individually.

Recognition and measurement take into account gains, losses and risks, which occurred prior to the presentation date of the Annual Report and which confirm or disprove conditions, which existed on the balance sheet date.

Income is entered in the profit and loss account as it is gained. Expenses involved in gaining the income of the year are included in the profit and loss account.

### Group relations and affiliated parties

Trade and services between companies within the group will be handled at market price or at a level meeting expenses.

### Accounting estimates

Determining the carrying value of certain assets and liabilities is associated with an estimate of how future events will affect the value of these assets and liabilities. Mostly determined by accounting estimates are liabilities under Provisions for outstanding claims.

### Fair value of domicile properties

To measure the fair value of properties an asset return model is used. The fair value on properties determined based on the calculated return on operations and the individually determined rate of return. The return rate is fixed on the basis on the location of the individual property, potential use, the state of maintenance, quality etc.

### Foreign Currency Translation

Transactions in foreign currencies are translated at transaction date.

Receivables, payables and other monetary items denominated in foreign currencies are translated at the balance sheet date are translated at the closing price at balance sheet date.

Gains and losses arising between the exchange rate at the settlement date are recognized in the income statement 'Exchange rate adjustments'.

### Key figures

These are rendered in accordance with Executive order no. 4 of 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies. Explanation of Key Figures is shown on page 14

# Frágreiðing til lyklatøl / Explanation of Key Figures

**Lyklatøl**

| Lyklatøl | | Teljari | Nevnari |
|---|---|---|---|
| Bruttoendurgjaldsprosent | = | - Bruttoskaðaendurgjøld x 100 | ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) |
| Bruttokostnaðarprosent | = | Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður í alt | ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) |
| Nettoendurtryggingar-prosent | = | Úrslit av endurtrygging x 100 | ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) |
| Combined ratio | = | - ( Bruttoskaðaendurgjøld + Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður í alt + Úrslit av endurtrygging ) x 100 | ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum ) |
| Operating ratio | = | - ( Bruttoskaðaendurgjøld + Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður í alt + Úrslit av endurtrygging ) x 100 | ( Bruttotryggingargjøld - Bonus og avsláttur av tryggingargjøldum + Rentu av tryggingarvirksemi ) |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum | = | - Úrslit av endurgjalds-avsetingum fyri egna rokning | Netto skaðatiltak við ársbyrjan |
| Eginognsavkast | = | Rakstrarúrslit x 100 | Eginogn (miðal) |
| Solvensdekningur | = | Grundarfæfeingið | Fæfeingiskrav |

**Key ratios**

| Key ratios | | Numerator | Denominator |
|---|---|---|---|
| Claim ratio | = | - Gross insurance claims x 100 | ( Gross written premiums - Bonus and rebates ) |
| Cost ratio | = | Total acquisition and administration costs x 100 | ( Gross written premiums - Bonus and rebates ) |
| Net reinsurance percent | = | Result of reinsurance x 100 | ( Gross written premiums - Bonus and rebates ) |
| Combined ratio | = | - ( Gross insurance claims + Total acquisition and administration costs + Result of reinsurance ) x 100 | ( Gross written premiums - Bonus and rebates ) |
| Operating ratio | = | - ( Gross insurance claims + Total acquisition and administration costs + Result of reinsurance ) x 100 | ( Gross written premiums - Bonus and rebates + Interest rate income from insurance activity ) |
| Relative effect on provisions | = | - Result from net claims provisions | Net claims provision at 1 January |
| Return on equity | = | Result for the year x 100 | Equity (average) |
| Solvency ration | = | Capital base | Solvency capital requirement |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri 2021 hjá Betri Trygging P/F.

Hálvársroknskapurin og leiðslufrágreiðingin eru sett upp samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 30. juni 2021, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskapartíðarskeiðið 1. januar - 30. juni 2021.

Tað er okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin gevur eina rættvísandi umrøðu av gongdini í virkseminum hjá Betri Trygging P/F og fíggjarligu støðuni, umframt eina rættvísandi lýsing av teimum týðandi váðunum og óvissu táttunum, sum felagið kann ávirkast av.

# Statement by the Management

As of today, the Board and Management have reviewed and approved the interim report 1H 2021 for Betri Trygging P/F.

The interim report has been rendered in accordance with the Faroese Insurance Act.

It is our opinion that the financial statement gives a true and fair view of the company's assets, liabilities, and financial position at 30 June 2021 and of the results of the company's operations for the period 1 January – 30 June 2021.

In addition, we also consider the Management's review to give a fair presentation of the development in the company's activities and the company's financial position as a whole, as well as a description of the significant risks and elements of uncertainty that may affect the company.

## Stjórn / Executive Board

**Betri Trygging P/F**
Tórshavn, 2. september 2021

**Ingunn Ósk Eiriksdóttir**
Forstjóri / CEO

## Nevnd / Board of Directors

**Lars Bonde**
Nevndarformaður / Chairman

**Teitur Samuelsen**
Næstformaður / Deputy Chairman

Gunn Danielsen

Jens Hjørleif Hansen*

Selinda í Heiðunum*

Evy J. Jacobsen

Mortan Joensen*

Mimi Steintórsdóttir

* Starvsfólkavalt umboð / *Employee Representative

# Partafelagsupplýsingar / Company Information

### Felagið / Company

Betri Trygging P/F
Kongabrúgvin
Postboks 329
FO 110 Tórshavn
Tel +298 345600
trygging@betri.fo
www.betri.fo

Skrás. nr. / Company no.: 3691
Roknskaparár / Annual Year: 19

### Nevnd / Board of Directors

Lars Bonde, nevndarformaður / Chairman
Teitur Samuelsen, næstformaður / Deputy Chairman
Gunn Danielsen
Jens Hjørleif Hansen*
Selinda í Heiðunum*
Evy J. Jacobsen
Mortan Joensen*
Mimi Steintórsdóttir

* Starvsfólkavalt umboð / * Employee Representative

### Stjórn / Executive Board

Ingunn Ósk Eiriksdóttir, forstjóri / CEO

### Grannskoðan / Auditors (við feitum)

Januar, løggilt grannskoðanarvirki P/F
PricewaterhouseCoopers Statsautoriseret Revisionspartnerselskab
Innanhýsis grannskoðanin í Betri samtakinum

**Betri Trygging P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 600
trygging@betri.fo
www.betri.fo